# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Nýggjur Matiz í 2009

**General Motors brynja seg nú av álvara til evropeiska marknaðin við fleiri nýggjum modellum frá Suðurkorea. Ein av hesum verður ein heilt nýggjur Chevrolet Matiz, sum kemur á marknaðin í 2009**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Tá ein nýggjur Chevrolet Matiz kemur á marknaðin í 2009, verður hann helst í stíl við konseptbilurin Chevrolet Beat*

Chevrolet arbeiða í løtuni við nógvum nýggjum koreanskum modellum til evropeiska marknaðin. Ein tann fyrsti verður ivaleyst tann minsti Chevrolet Matiz, sum nú verður nakað størri og meira spennandi enn forgangarin.

Nýggi Matiz verður helst tann, sum var sýndur fram sum konseptbilurin Chevrolet Beat á altjóða bilaframsýningin í New York fyrr í ár. Chevrolet Beat varð sýndur fram saman við tveimum øðrum líknandi bilum: Chervolet Groove og Trax, sum eru bygdir yvir sama plattform og eru teknaðir á Design Studio i Incheon í Suðurkorea, sum General Motors eiga.

Chevrolet Matiz verður gjørdur við bæði trimum og fimm hurðum og kemur eftir ætlan á evropeiska marknaðin í 2009.



*Konseptbilurin Chevrolet Trax varð sýndur fram saman við Beat á altjóða bilaframsýningin í New York fyrr í ár*



*Nýggi Matiz verður helst gjørdur við bæði trimum og fimm hurðum og kemur eftir ætlan á evropeiska marknaðin í 2009*



*Chevrolet Beat innan í nútímans hi-tech stíli*